# Dukkumentar til Berlin og London

**Marianna Mørkøre og Rannvá Káradóttir sláa alsamt nøvn síni fastari í altjóða listaheiminum. Í januar sýndu tær øðrvísi animatiónina »Dukkumentar« fram í Lítluvík. Nu eru tær bidnar at koma til London og Berlin og sýna fram**

TÍÐINDASKRIV
*eydna@sosialurin.fo*



*Rannvá Káradóttir og Marianna Mørkøre høvdu í vetur eina framsýning, ið tær nevndu »Dukkumentar«. Talan var um slóðbrótandi list, ætlað posttannáringunum í Føroyum. Men framsýningin hevur eisini vakt ans úti í heimi, og er í summar umbiðin bæði í Berlin og London*

*Mynd: Savnsmynd, Kristina Sørensen*

Rannvá og Marianna settu sær seinasta summar fyri at gera okkurt øðrvísi listarligt til ungar føroyingar. Tær ynsktu at bróta vanligu fatanina av hvat list er og vísa á, at list ikki bert er málningar, sum hanga á einum hvítum veggi, við einum ávísum millumrúmi. Tað eydnaðist sera væl, og nú eru tær bidnar um at koma til Berlin og London við framsýningini »Dukkumentar«

## Berlin

3.- 4. juni verður møguleiki at síggja video installatiónina »Dukkumentar« í Týsklandi. Framsýningin verður í gallarí Salonk Zutteronk í Berlin, ið hevur víst stóran áhuga í verkætlanini.

Men Marianna og Rannvá halda fast um tað óvanliga, og tær ætla eisini at sláa eitt slag fyri føroysku ferðavinnuna. Talan verður nevniliga eisini um eitt kunnandi føroyskt vikuskifti. Føroyar verða umboðaðar við tilfari frá føroyskum ferðastovum og myndum úr serføroyska myndasavninum hjá tónleikabólkinum Dejavu.

Á framsýningini er eisini ein løta sett av til spurningar, ið vitjandi hava antin um dukkumentarin ella føroysk um viðurskifti.

Fyrireikingararbeiðið til framsýningina hevur gingið væl, og Marianna og Rannvá siga seg hava fingið sera góða hjálp frá ymiskum ferðastovum, ið hava latið plakatir, faldarar og videoklipp um Føroyar. Salonk Zutteronk, har tær skulu sýna fram, er ein av teimum ungdómssinnaðu gallaríunum í Berlin, ið bæði hýsur list og café lívi. Fólk hava sýnt tiltakinum stóran áhuga, og tær rokna tí við, at tiltakið verður sera vælvitjað.

## London

Aftaná tiltakið í Berlin verður framsýningin sett upp í London.

Tað er Nottinghill Arts Club, i hevur bjóðað »Dukkumentar« til Beach-Night, sum er eitt serligt mánaðarligt tiltak, har útvald ung skandinavisk listafólk kunnu sýna fram síni verk. Nottinghill Arts Club er ein sera kendur klubbur fyri nýskapandi list og tónleik í London, og tey hava biðið ungu føroysku kvinnurnar koma at sýna fram.

## Ólavsøka

Á ólavsøku 2005 fáa føroyingar eisini høvi at síggja og uppliva dukkumentar í nýggjari útgávu saman vi einari nýggjari verkætlan hjá Mariannu og Rannvá.

Í løtuni fyrireika tær eina framførslu, ið verður sýnd fram í einum spennandi ótraditiónellum umhvørvi, har eksperimenterað verður við rúmd og konstruktión. Tað er Mentamálaráðið, ið stuðlar hesi verkætlan.

Tiltakið er eitt samanspæl ímillum tvær listagreinir - dans og videolist - har útgangstøðið er at gera eina »site specific« framsýning fyri ung, har listin verður tikin út úr listasavninum og sýnd fram í einum óvanligum umhvørvi.

Eins og við framsýningini »Dukkumentar« er endamálið at skapa og menna eina mentan fyri nýskapandi ungdómslist í Føroyum.

Tað hava Marianna og Rannvá valt at gera, tí tær meta, at úrvalið av tiltøkum til posttannáringarnar tykist at vera sera avmarkað. Tískil hava tær henda aldursbólk sum málbólk.

## Týdning at stuðla

Rannvá og Marianna halda tað vera av stórum týdningi at kunna og menna tey ungu listarliga. Tær vilja gera sítt til at geva íblástur til tey ungu í Føroyum, og harvið vekja áhuga fyri alternativari ungdómslist, soleiðis, at føroysku listakarmarnir verða øktir og víðkaðir.

Við øðrum orðum vilja tær geva ungum íblástur til at trúgva uppá seg sjálvan í altjóða høpi.

– Eftir at hava búð og lisið í útlondum í fleiri ár, hava vit møtt nógvum fólki, sum hava sýnt sera stóran áhuga í Føroyum og í føroyskari list, siga tær í tíðindaskrivi.

Víðari siga tær, at tiltøk, sum eitt nú »Dukkumentar«, eru við til at seta Føroyar á heimskortið.

– Tað er tí av stórum týdningi at stuðla ungum føroyskum listafólki, ið gera um seg í útlondum - ikki bert fyri at menna føroyska list, men eisini fyri at kunna um Føroyar og føroyska list, siga tær.

## Úr at gera uttanlands

Umframt at tær arbeiða við eini broyttari dukkumentar til Ólavsøkuna, hava tær úr at gera við ørðum verkætlanum.

Rannvá fyrireikar í løtuni eitt dansistykki við dansarum úr London, sum skal sýnast fram til dansifestivalin »Dansolution«, sum verður í Keypmannahavn 7.-10. september. Tá sleppa 14 útvaldir koreografar at sýna fram síni verk. Eftir sýningina verða 3 koreografar valdir út til at samstarva við

Dansescenen í eitt longri tíðarskeið, og møguliga verður Rannvá teirra millum.

Harumframt hevur Værkstedscenen í Århus bjóða Rannvá at arbeiða uppá eina koreografi til 3 dansarar. Hetta verkið verður framført í Føroyum seinni í ár saman við øðrum koreografium hjá Rannvá.

Marianna fyrireikar í løtuni eitt norðurlendskt tíðarrit saman við einum svenskum fotografi. Talan er um eitt tíðarrit, sum skal lýsa norðurlendska list og mentan á ein nýskapandi visuellan hátt.

Herfyri var video installationin, sum Marianna fekk eina design-virðirsløn fyri í juni 2004, innstillað til New Contemporaries í London, ið er ein ferðaframsýning fyri nýútbúgvin listafólk. Bert 90 av 1100 umsøkjarum sluppu við, og Marianna slapp sostatt ígjøgnum tronga nálareygað.

14.-21. oktober skal installatiónin sýnast fram í 84Ghz í München, og meðan Marianna er í Berlin við »Dukkumentar«, fer tíðarriti BluePrint at húsa installatiónini, og sostatt fáa hana sýnda fram í London.

Marianna og Rannvá eru sostatt livandi tekin um tað, tær royna at vísa ungum føroyingum á við teirra list. Nevniliga at tað ber til at gera seg galdandi uttanlands, hóast – ella kanska netupp tí – man kemur úr Føroyum.

# Tað ger mun

Vit í Amnesty Ungdómsbólkinum í Hoydølum fegnast um, at avrættingin á 23 ára gomlu Aminu Ali Abduladif úr Yemen, sum skuldi vera mánadagin 2. mai, er útsett.

Amina Ali Abduladif varð í 1998 dømd til deyða fyri at hava dripið mann sín. Tá var hon bert 16 ára gomul, og sambært Yemeni Penal Code lógini er ikki loyvt at nýta deyðarevsing mótvegis fólki undir 18 ár.

Í fyrstu syftu varð hon útsett fyri torturi, og var hetta ein ætlan at fáa hana at játta seg sekan. Hetta eydnaðist eisini, men síðani tey góvust at torturera hana, hevur hon noktað seg seka.

Avrættingin er eina ferð áður útsett, tá tað vísti seg, at Amina var við barn. Sambært sakførarunum hjá Aminu varð hon neyðtikin av einum vaktarmanni á al-Mahaweet fongslinum.

Tá Amnesty frætti um Aminu og støðu hennara, varð ein stór mótmælisherferð sett í gongd kring allan heimin, og forsetin í Yemen fekk túsundtals av brøvum, teldupostum, faxum og sms´um. Millum annað fekk hann 25 fax frá fólki, sum vóru til staðar og skrivaðu undir hesi mótmælisbrøv, tá ið Amnesty Ungdómsbólkurin skipaði fyri einum Amnesty café-kvøldi í Studentaskúlanum fríggjakvøldið 29. apríl.

Enn er óvist, hvør lagnan hjá Aminu verður; Amnesty veit enn ikki at siga, um dómur hennara verður broyttur, ella um hon skal gjøgnum nýggja rættargongd. Men Amnesty fylgir við í málinum, og vit vóna tað besta fyri Aminu.

Vit vilja at enda nýta høvið at takka teimum, ið skrivaðu undir, og ein serlig tøkk til Margrethu Nónklett, samskipara hjá Amnesty Føroya Deild, ið hevur lagt okkum lag á.

Ein undirskrift kann tykjast lítisvert, men eru tær fleiri í tali, kunnu tær gera stóran mun. Tað hava vit sannað.

*Amnesty Ungdómsbólkurin í Hoydølum*